**VIÐMERKINGAR**

# Hond í hond, so finna vit stevið

RANDI Í JÓGVANSTOVU
Leirvík



Tøkk til tykkum, borgaraumboð, sum skipaðu fyri fundinum 10. februar 2006 í Leirvík. Kommunustýrið hevur tørv á tykkara stuðli, og vit fingu stuðul so tað munaði. At leirvíkingar meta hettar málið vera eitt stórmál, fekst prógv fyri hettar kvøldið.

Borgarin í Leirvík hevur eisini visiónir fyri framtíðini, og hesar visiónir steðga ikki á í ár 2015. Vit hugsa longur enn so, tá tað snýr seg um bygdina, vit eru so góð við.

Okkara størstsa aktiv í dag, eru bústaðarøkini. Tryggar og góðar umstøður til familjur, at búsetast og mennast í. Vit hava ansingartrygd, einki barn skal á bíðilista. Ein skúli í besta standi, nýtt eldrasambýli, eisini eru vit við í útbyggingini av Eysturoyar Ellis- og røktarheimi, har okkara eldru borgarar, kunnu fáa alla ta røkt, tey hava tørv á.

Heldur ikki vinnan er við sviðið soð. Stórt øki verður til reiðar at taka í brúk, um stutta stund á Kráartanga. Úti á Vík er stórt øki útlagt til vinnuna, tá Dúgvan gevst at sigla, er eitt stórt øki har á ferjuleguni. Fyri at tað so ikki skal vera heilt lygn, fylla vit út í skrivandi stund, norðanfyri virkið hjá Kjartani Joensen. À jú vist verður fjálga um vunnuna í Leirvík. Hon kann fara til verka, tá henni lystir, tað er vist.

Avgera tit landspolitikkarar, at lurta eftir Bjarna Djurholm, noyðast vit at ásanna, at tað vóru einans tóm orð, tá sagt varð, at alt skuldi verða gjørt í samráð við Leirvíkar kommunu. Vit hava ongantíð biðið um ein veg gjøgnum alt okkara framtíðar byggilendi. Kann henda, at tað er ein bíligari loysn í fyrsta umfari, men sum vit øll vita, so hitar tað stutt, at pissa í buksurnar.

Anfinn Kallsberg hevur einaferð sagt: Tað sum verður gott fyri norðoyingar, skal ikki verða ringt fyri leirvíkingar, tað fari eg at minna hann á, nú hann situr sum formaður í fíggjarnevndini. Tala nú okkara søk vinurin, tað biði eg teg.

Síðani ein áheitan til Javnaðarflokkin. Lurtið eftir Andrias Petersen, tá hann tosar um 100 ár fram í tíðina (tunnilsloysnin), so veit hann hvat hann tosar um. Hann býr sjálvur í einum av teimum bygdunum, sum eru spoleraðar av einum gjøgnumgangandi motorvegi. Læri av ringum royndum.

Gøtu kommuna, hjartans tøkk fyri tykkara stuðul, tað skal ikki verða tykkum gloymt.

Við vón um tí bestu tunnilsloysnina fyri Leirvík.

# Aftursvar til fitt hugarensl

NICOLINA JENSEN BEDER



Fyrst vil eg takka Jenis av Rana, fyri svarið uppá spurning mín, um endurgevingina av Luk. 17. kap. 34. v.

Jenisa svar er: Endurgeving mína finna tygum í Luk. 17,34 og ljóðar skriftorðið so í týðing Victor Danielsens: *»Eg sigi tykkum: Ta nátt skulu tvey vera í eini song; annað skal verða tikið við*, og annað verða latið eftir«. Takk fyri góð ráð, men ikki gjørdist neyðugt hjá mær, at fara á netið at leita. Nýggjatestamenti hjá Victor Danielsen fekk eg í fermingargávu 1942.

Í fororðinum skrivar Victor Danielsen: Sum grundarlag fyri hesi umseting havi eg brúkt ta donsku av 1907, ta norsku 1904 og ta svensku av 1917. Í einstøkum tilfellum havi eg fylgt Thomas Newberry og ikki sjáldan Robert Young: »Literal Translation of the Bible«. Eftir hesi síðstnevndu er soleiðis Rom. 9, 1-3 umsett. Á nøkrum fáum støðum havi eg fylgt Luthers umseting. 1 Kor. 7, 36-38 er umsett eftir tí týsku Elberfelder-bíbliuni. J. Dahls føroyska umseting er mangastaðni fylgd, hvat ið viðvíkur at finna føroysk orð og orðafellir.

Í Bíbliuni, eg endurgav stendur: Luk. 17. kap. 34 v. Eg sigi tykkum: *Í teirri nátt skulu tveir menn vera í eini song; annar skal verða tikin við, og annar latin eftir*. Á nummar tvey síðu stendur: Bíblia. Tað er Halgabók. Gamla Testamenti og Nýggja. Týdd úr frummálinum. Hetta er helst J. Dahls føroyska umseting, tó eg ikki finni navnið.

Í danskari Bíbliu stendur: I den Nat skulle to Mænd være på eet Leje; den ene skal tages med, og den anden skal lades tilbage. Á síðu tvey stendur: Bibelen. Den Hellige Skrifts Kanoniske Bøger.

Hetta hevur fyri so vítt einki at gera við, hvør ið liggur hjá hvørjum. Tað, sum sagt verður frá er, at Jesu afturkoma verður so óvantað, at bert ein av tveimum verður tikin við, tað verður seg av tekjuni ella úr seingini.

Fyri mær eru hesar ymisku týðingarnar besta váttan um, at Brimnes, prestur, hevði rætt, tá ið hann segði, at til bar at seta spurningar við, tá ið ein læs Bíbliuna, júst tí tað vóru ymiskar umsetingar.

Aftursvarið um Jesus-køkurnar eri eg ikki nøgd við: »Men neyvan hevur hatta so nógv uppá seg, uttan iva er talan um fjøðurina, ið gjørdist til fleiri hønur«. Mær vitandi verður handan vendingin nýtt um fólk, sum skrøggar ella lýgur, men so er ikki í hesum føri. Eg fari at enda eins og vanligt var at hoyra, tá ið tosað var millum skipini í fimtiárunum. Yvir og farin.

# Føroyahúsið í Árhus hevur eisini brúk fyri stuðli

FØROYINGAFELAGIÐ Í AARHUS

Føroyahúsið í Aarhus, í dagligari talu nevnt Áarstova, hevur í mong Harrans ár hildið til miðskeiðis í Aarhus. Føroyingafelagið í Aarhus tekur sær av dagliga rakstrinum, og húsini eru karmur um nærum alt virksemið, ið Føroyingafelagið í Aarhus hevur.

Av føstum tiltøkum kann nevnast café frá týsdegi til hósdag; og barr hvørt leygarkvøld. Barnaskúli er annan hvønn leygardag, og sunnudagsskúli er annanhvønn sunnudag. Felagið stendur fyri útgávuni av Áarósanum, ið er málgagn felagsins. MFS húsast eisini í Føroyahúsinum í Aarhus og hevur skrivstovutíð hvønn týsdag.

Føroyingafelagið stendur eisini fyri innandurafótbólti, batminton og flogbólti. Umframt hetta so skipar felagið eisini fyri mentanarligum tiltøkum við eitt nú livandi tónleiki og fyrilestrum. Føroyahúsið í Aarhus er karmur um flaggdagshald, grækarsmessuhald og veitslum av alskyns slagi.

Hóast Føroyingahúsið í Aarhus, eins og Føroyahúsið í Keypmannahavn, er karmur um alskyns mentanarlig tiltøk til tess at stimbra føroyskan samleika og fáa føroyingar í Aarhus og aðrastaðni til at kenna seg væl í kendum umhvørvi, letur Landskassin ikki 1,- kr. til rakstur av húsinum ella til virksemi felagsins. Aarhus Kommuna stuðlar felagnum við at lata stuðul, ið svarar til 70% av leiguni. Harvið er sagt, at nærum alt arbeiðið, ið fer fram í Føroyingahúsinum í Aarhus er sjálvboðið og ólønt.

Nevnd eftir nevnd stríðist soleiðis fyri at fáa endarnar at røkka saman. Øll tiltøk mugu og skulu geva yvirskot, tí felagið hevur ikki ráð til annað. Sigast skal tó, at tað av og á eydnast at fáa stuðul frá privatum fyritøkum – tær fyritøkurnar skulu hava eina hjartans tøkk fyri tað.

Vísandi til lesarabræv hjá Martin Fjallstein, leiðara í Føroyahúsinum í Keypmannahavn tann 3. januar, so vilja vit vísa á, at tað er ein heil verøld á muni á teimum umstøðum, ið Føroyahúsið í Keypmannahavn hevur at arbeiða undir, og so teimum, ið Føroyahúsið í Aarhus hevur at virka undir.

Føroyahúsið í Keypmannahavn fær 1,4 milliónir hvørt ár úr Landskassanum, ímeðan Føroyahúsið í Aarhus ikki fær 1,- kr. Í Keypmannahavn hava tey Føroyahús, Sendistovuna, Bryggjuna o.a., ið verður fíggjað úr Landskassanum. Í Aarhus hava vit bara Føroyahúsið.

Vit halda, at tað er undranarvert at ímeðan føroyskir politikarar vilja forða miðsavnan í eitt nú Keypmannahavn, so verður allur almennur peningur miðsavnaður í Keypmannahavn. Vit sakna at fleiri politikarar taka málið upp og hjálpa okkum við at bøta um umstøðurnar hjá føroyingum uttan fyri Keypmannahavn. Umframt Aarhus, so eru sum kunnugt hópin av føroyingum eisini at finna í Odense, Esbjerg og Aalborg og aðrastaðni.

Fyri 4 árum síðan vóru føroyahús ella føroyingahús í Odense, Aarhus, Esbjerg og Aalborg. Í dag finnast bert føroyahús í Esbjerg og Aarhus. Og heldur gongdin fram, so er vandi fyri, at eisini Føroyahúsið í Aarhus dettur niðurfyri.

Umframt týdningin av at hava eitt føroyahús ella føroyingafelag, har føroyingar kunnu koma saman, virkar húsið eisini sum eitt stað, har man finnur nøkur av sínum egnu og knýtir vinabond. Uttan eitt felagsstað, so er vandi fyri, at føroyingarnir blíva vekk í nærumhvørvinum; og vónirnar fyri, at tey ungu, spírandi fólkini eftir loknan lesnað venda nøsina aftur til Føroyar, minka munandi.

Tað sum vit vilja er, at Føroya Landstýri og Løgting viðurkenna tann týdning, ið felagsarbeiði okkara hevur fyri útisetar her um leiðir. Um vit ynskja tey heimaftur; so má okkurt gerast fyri at varðveita tilknýtið til Føroyar. Um Føroya Landsstýri og Løgting ikki ynskja tað – so er bara at siga tað alment og lata føroyahúsini uttan fyri Keypmannahavn sigla sín egna sjógv og framhaldandi senda allan almennan stuðul til eitt og sama stað – nevniliga Keypmannahavn.

Fyri at venda aftur til nevndararbeiðið í Føroyingafelagnum í Aarhus, so má sigast, at søgan vísir, at virkisframar og framskygdar kreftir drukna í ævigu jagstranini eftir ikki at fáa reyð tøl á botnlinjuna. Hetta slítur upp á hugin til felagsarbeiðið og ger, at nýggjar kreftir ikki gerast drúgvar kreftir.

Vit í Aarhus kundu hugsað okkum at havt tiltøk, ið ikki noyðast at geva yvirskot – eitt nú fleiri fyrilestrar, ferniseringar, lestrardagar fyri lesandi, útferðir o.a.

Vit kundu hugsað okkum, at tær almennu Føroyar funnu fram til ein býtislykil, ið eitt nú kundi givið stuðul til Føroyahús ella føroyingafeløg, ið høvdu tiltøk av ymsum slag. Myndugleikarnir kundu umsitið játtanina skynsamt og tryggjað sær, at virkin feløg fingu takkarløn fyri tað arbeiðið, ið tey gera fyri at stimbra føroyska mentan og samleika.

*Aarhus 15. februar 2006*
Við vón um viðurkenning, og ikki minst stuðul, frá føroyskum politikarum og myndugleikum
*www.aarstova.dk*

# Til Útvarp Føroya

SÓLVIT SIMONSEN



Nú hevur tvær ferðir í trekk tað gleðiliga hent her á Sandi, fyrst móttøka og stak hugnalig løta av Pop Korn.

Og nú aftur í gjár við roysnissvimjaranum Ragnvald Jensen, báðu ferð kunngjørt í útvarpinum, og atlikavæl letur útvarpið ikki við seg koma, hóast útvarpsmaður býr fá skritt burturfrá.

Hetta tykir mær løgið, tí hvørja ferð ein hani ger eitt avrik í grannabygdunum, so er útvarpið til staðar.


# Illur???

Sig tína meining í Sosialinum

